# Havnin á Oyrareingjum tikin í nýtslu

**Leygardagin varð hátíðarhildið, at nýggja havnin á Oyrareingjum varð tikin í nýtslu**

HÁTÍÐARHALD
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast nógv rumbul hevur verið um havnina á Oyrareingjum, so varð hon leygardagin alment tikin í nýtslu. Sera nógv fólk vóru komin saman. Serliga kollfirðingar og politikarar vóru at síggja.

Havnar Hornorkestur hevði funnið vegin fram til útjaðaran av kommununi, og Ovi Olsen stýrdi tónleikinum, sum ekkóaði um allan Smyril, ið var lagdur á Oyrareingjum til endamálið.

Síðani bar Jákup Símun Simonsen, formaður í havnarnevndini, fram røðu, har hann greiddi frá longu tilgongdini, ið hevur verið, áðrenn ídnaðarhavnin endiliga varð tikin í nýtslu.

Veðurgudarnir eru ikki beinleiðis blíðir í dag, og ein kundi freistast at hugsa, at onkur ætlan var ímóti hesi havn, sum so nógv kjak hevur verið um. Hetta hevði millum annað við sær, at hátíðarhaldið varð flutt inn á bildekkið á Smyrli.

Men so skjótt, tað var klárt at skera endan fyri hesi nýggju havn, so sleit í, og sólin hevði enntá hug at skína.

Tiltakið endaði við einum stórum kaffiborðið í matstovuni á slagskipinum hjá Strandferðsluni. Og frá leygardegnum, var ein nýggj ídnaðarhavn í Tórshavnar kommunu.



Borgarstjórin og formaðurin í havnarnevndini skóru endan. Harvið varð havnin á Oyrareingjum tikin alment í nýtslu



Hetta vegastrekkið, er tað, ið mikið stríð hevur verið um, men í farnu viku varð semja gjørd millum Landsverk og Tórshavnar kommunu um vegin



Beint áðrenn snórurin skuldi klippast blíðkaðust veðurgudarnir



Eldri sum ung vóru komin at hátíðarhalda havnina



Ovi Olsen stjórnaði Havnar Hornorkestri

# Brúkti 170 ára gamlan knív



Jákup Símun Simonsen, formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar kommunu, flutti fram røðu

**Jákup Símun Simonsen segði áhugaverda søgu, áðrenn hann saman við borgarstjóranum læt nýggju havnina á Oyrareingjum upp**

HÁTÍÐARHALD
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir at hann hevði hildið stutta røðu á Oyrarreingjum seinnapartin, segði Jákup Símun Simonsen, formaður í havnarnevndini hjá Tórshavnar býráð, hesa søguna, áðrenn hann saman við borgarstjóranum, Heðini Mortensen, skar snórin:

Í 1837 varð bygdin Hvítanes bygd. Niðursetufólkini har komu so at siga øll hiðani av fjørðinum. Tað var Pløyen amtmaður, sum fekk hettar í lag, tí so nógvir bátar settu upp á Hvítanesi, og ov langt var haðani til næstu búsetu. Eitt av teirra serliga góðu evnum var, at teir og teirra eftirkomarar vóru sera góðir smiðir, og ta einu tíðina vóru ikki færri enn fýra smiðjur á Hvítanesi. Har vóru øll amboð virkað til, og enntá gjørdu teir byrsur. Frá mínum forfedrum havi eg ein knív, sum er gjørdur av hvítanessmiðunum, og er tað við tí knívinum, eg fari at skera snórin um eitt bil. Neyvan høvdu teir hugsa sær, tá fyri góðum 170 árum síðani, at ein av teirra knívum skuldu skera snórin til eina nýmótans og framkomna binguhavn á Oyrareingjum, men tað verður veruleiki.